## Eysturoyar Røktar- og ellisheim

# Til Heimið á Mýrunum

verður søkt eftir fólki við røktarfagligari útbúgving 0,6 tíð í blandaðum vaktum.

Starvið verður at seta 15. august 2010 ella eftir nærri avtalu.

Starvstíðin er til 31.08.2011

Á heiminum er pláss fyri 8 minnisveikum fólkum.

Umstøðurnar á heiminum eru góðar og væl egnaðar til fólk, ið eru minnisveik. Harumframt liggur heimið í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn.

Endamálið við heiminum er at geva minnisveikum fólki, við serligum tørvi á umsorgan, eina trygga og stimbrandi tilveru.

Vit ynskja starvsfólk sum hevur áhuga og hegni til at vera um minnisveik fólk.

Stórur dentur verður lagdur á, at trivnaður bæði fyri búfólk og starvsfólk eyðkennir heimið og væntа vit tí av tær, at tú hevur áhuga og gleði við, at samskifta við eldri fólk og at tú hevur vilja og eginleikar at samskifta við starvsfólk og avvarðandi.

Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært galdandi sáttmála.

Nærri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við deildarleiðaran á tlf. 290209 ella 477080

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til:

Eysturoyar røktar- og ellisheim
att: fyristøðumaðurin
Friðartún 1
620 Runavík

Umsóknarfreist: týsdagin 20. juli 2010, kl. 12.00

**Eysturoyar Røktar-og ellisheim**
**Friðartún 1 · 620 Runavík**


**Bílegg beinleiðis á netinum**



# Hevur tú HUND?

## So burdi tú eisini havt SKYTTENs SPECIAL

**SKYTTENS hunda- og kettufóður er hágóðskufóður, framleitt í Danmark síðan 1970.**

**SPECIAL** (20 kg)

Turrfóður til vaksnar hundar við vanligum tørvi. Gevur blankan pels. Er eisini sera vælegnað til hundar við húð- og pelstrupulleikum og eldri hundar.

**Fyri posan..... kr. 450,-**




**fodursolan.com**
**Tel. 21 19 96**
info@fodursolan.com
Ókeypis útkoyring í høvuðsstaðarøkinum


# Tvingsilssøla av skipi

**Týsdagin tann 20. juli 2010**, kl. 10:00 verður á Dómaraskrivstovuni, Undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir fiskiskipið Nípan, kallibókstavir OW 2131, BRT 6,3 og NRT 1,8.

Skipið er bygt í 1992 á verksmiðjuni Provincial Boat Marnie Ltd. Skipið er skrásett sum heimahoyrandi í Miðvági. Eigari av skipinum er P/f Vesturhavið í konkurs.

Tvingsilssølan er umbiðin av Petur Even Djurhuus, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 8801109), sum kann geva nærri upplýsingar um skipið og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja skipið.

Áhugað kunnu eisini síggja søluuppstilling og onnur skjøl í sambandi við tvingsilssøluna við at venda sær til Dómaraskrivstovuna tlf. 311003 (sak nr. AS 2-44/2010).

*Føroya Fútarættur*

**STUDNI** Student Grant Fund

# Ferðastuðulin til lesandi uttanlands

Síðsta freist at søkja um ferðastuðulin fyri inniverandi skúlaár er 31. juli 2010.

Hetta er galdandi fyri øll tey, ið byrjaðu lesturin á heysti, t.v.s. millum 1. august og 31. desember.

Víst verður til heimasíðuna www.studni.fo.

Hoyvíksvegur 72 · Postsmoga 3279
FO – 110 Tórshavn · tlf. 30 65 65 · fax 30 65 66
studni@studni.fo · www.studni.fo

**STUDNI** Student Grant Fund

# Summarfrí

Vegna summarfrí er Studni stongdur frá 12. juli. Opið verður aftur 9. august.

Hoyvíksvegur 72 · Postsmoga 3279
FO – 110 Tórshavn · tlf. 30 65 65 · fax 30 65 66
studni@studni.fo · www.studni.fo

# Endurlýsing: Másin til sølu

Við hesum verður Strandfaraskipið M/S Másin endurlýstur til sølu. Freistin at koma við boðum er 20. juli kl 12:00. Lýsingin sæst á www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS


# KOYRIKORT?
## EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið byrjar mánadagin 5. juli 2010 kl. 18:00.**

**R/F-skeið verður eisini.**

**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Jari Lykke | 590500 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |
| Hugo Kristiansen | 225225 |




**EYSTUROYAR TEORISKÚLI**




# Broytt evstamark

Vegna framskundað evstamark fyri prent av blaðnum, skulu lýsingar til vikuskiftisSosialin nú vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdag kl. 14.00

**Sosialurin**

Sosialurin · Postboks 76 · FO-110 Tórshavn